


## Sendarin hjá Rás2 fluttur

Nú er høvussendarin hjá Rás 2 á FM 102.0 Mhz fluttur frá Varða í Havn og út í nýggja húsið hjá R2 Net á Eggjarkletti á toppinum á Nólsoynni. Hetta merkir, at meira enn helvtin av øllum húsarhaldunum í Føroyum nú kunnu lurta á somu tídd fyri at hoyra Rás 2.

# , hvat so?



**Sjúrður Skaale, Norðuratlantsbólkurin**

Sjúrður Skaale málaði eina skemtiliga mynd av ríkisrættarligu støðu Føroya og Danmarks. Sjúrður greiddi frá, hvussu hann hevði kært sína neyð fyri táverandi ST-aðalskrivaranum Kofi Annan, og fortalt honum hvussu Føroyar vórðu kúgaðar av Danmark. Kofi Annan hevði áhugaður spurt, hvussu nógvir føroyskir frælsisstríðsmenn vórðu dripnir av dønum, og hvussu nógvir føroyskir politikarar sótu fongslaðir í Danmark. Tá Sjúrður so svaraði, at eingin var dripin ella sat í gegli, spurdi tann undrandi ST-aðalskrivarin so, hvussu Føroyar vórðu kúgaðar. Og tað var tað so at Sjúrður svaraði, at danir kúgaðu føroyingar við at tveita hundraðtals milliónir av krónum eftir teimum árliga. Henda søga er áður er brúkt sum atfinning og niðurger av Tjóveldinum og arbeiði teirra, men Sjúrður Skaale brúkti hana skemtiliga til at undirstrika høvuðsevnið á Studentadegnum, sum var: “Farvæl til blokkstuðulin – og hvat so?”.



**Peter Skaarup, Dansk Folkeparti**

Peter Skaarup gjørdi eins og Naser Khader og Sjúrður Skaale, og valdi skemtiliga inngangsvinkulin til sítt upplegg. Hann endurgav søguna, sum danska gratisavísin MetroExpress kungjørdi 1. apríl, um at hann einki hevði ímóti at selja Grønland, nú USA hevði bjóðað 1,2 milliardir krónur upp á landið. Tí, sum Peter Skaarup var endurgivin fyri at siga, so hevði Grønland ikki volt Danmark annað enn trupulleikar seinastu árini. Síðani minti Peter Skaarup á, at tað er annað enn blokkstuðul, sum bindir londini í ríkisfelagsskapinum saman. Eitt sjónarmið, sum allir røðarar førdu fram. Peter Skaarup skapti annars ikki øsing á sama hátt, sum Søren Espersen gjørdi til seinasta Studentadagin, og Peter Skaarup segði seg enntá, at hann var positivt sinnaður yvir fyri spurninginum um “selvstyre”, sum hann tók til. Men tá tað snýr seg um “selvstændighed” er støðan ein onnur, gjørdi hann greitt.



**Margrete Vestager, Det Radikale Venstre**

Margrethe Vestager frá Radikale Venstre gav Føroyum so at siga einki pláss í sínum uppleggi. Tá góðir tíggju minuttir vóru farnir, og hon enn ikki hevði nevnt Føroyar við einum orði, vóru tað fleiri sum fóru at ivast í, um hon hevði misskilt sína uppgávu á degnum. Men tá talitíðin var um at vera uppbrúkt, nevndi hon at enda tær 18 oyggjarnar fyri norðan. Hon staðfesti, at støðan hjá Grønlandi og Føroyum ikki er sambarlig, og at tað eisini var orsøkin til, at hon ikki hevði umrøtt Grønland, Føroyar og Danmark samstundis. Felags var tó, at týdningurin av at londini gjørdu avtalur, har pláss var fyri báðum pørtum, var tann sami, undirstrikaði Margrethe Vestager. Eins og hinir politikararnir ynskti Margrethe Vestager, at kjakið aftaná fór at snúgva seg um, hvussu londini í ríkisfelagsskapinum hava brúk fyri hvørjum øðrum, heldur enn spurningin um blokkstuðulin.



**Bertel Haarder, undirvísingarmálaráðharri**

Bertel Haarder úr Venstre, byrjaði við persónliga vinklinum til Føroyar og Grønland. Eins og øll hini, so hevði sjálvt undirvísingarmálaráðharrin eisin fleiri góðar upplivingar í Føroyum og Grønlandi – fakligar eins væl og persónligar.

Bertel Haarder brúkti síðani nógva tíð upp á at umrøða studentareformin, hvussu hann virkaði og hvørjar broytingar skulu gerast, tá hann skal tillagast aðrastaðni. Síðani var hann inni á, at man átti at gjørt øll Norðanlondini sum eitt áhugaverdari samstarvsøki. Her vísti hann á, at tað privata á nógvum økjum hevði yvirhálað politikararnar.

At enda segði Bertel Haarder seg fegnast um, at vit seinnu árini hava dugað betur at samansjóða alsamt vaksandi talið av yvirtøkum, samstundis sum vit á øðrum økjum eru farin í tættari samstarv.



**Kristina Háfoss, mentamálaráðharri**

Kristina Háfoss tók fram tøl og fakta, sum siga, at alsamt færri føroyingar flyta heimaftur eftir lokna útbúgving. Tað kann gerast okkara vanlagna, og keðiliga gongdin má vendast, vísti Kristina Háfoss á. Hon helt, at Føroyar eiga at hava sum mál at gerast eitt kappingarført vitanarsamfelag, og tískil mugu fleiri pengar setast av til útbúgving, gransking og mentan. Tá landsstýriskvinnan umrøddi hetta evni, nevndi hon eisini, at Føroyar nærkast eini samstarvsavtalu við ES um útbúgving og gransking.

At enda í síni fimm minuttir langu røðu, nam Kristina Háfoss við spurningin um sentralisering og útjaðaran. Ein spurningur, sum hevur verið nógv viðgjørdur heima í Føroyum. Her segði Kristina Háfoss, at Føroyar og Grønland eru at rokna sum útjaðarar, men at vit kunnu gera okkum galdandi, um vit eru við í fremstu røð á nøkrum úrvalsøkjum.



**Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri**

Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri úr Miðflokkinum, vil hava føroyingar at skilja, at vit skulu rinda rokningina sjálvi. Tað var høvuðsboðskapur hansara, tá Karsten Hansen hann hevði orðið á Studentadegnum fríggjadagin.

Upplegg hansara tók beinleiðis støði í yvirskriftini fyri dagin, nevniliga “Farvæl til blokkstuðulin – og hvat so?” Við einum skeivum smíli helt hann fyri, at tað fyri summi kanska kundi tykjast sum eitt paradoks, at ein fíggjarmálaráðharri brúkar orku uppá at frásiga sær pengar. Men síðani gjørdist andlitsbráið meiri álvarsamt, og landsstýrismaðurin hjá Miðflokkinum gjørdi greitt, at vit mugu rinda rokningina fyri tað vit fáa. Eins og Kristina Háfoss staðfesti hann sjálvsagda týdningin av, at ung útbúgvin fólk venda heimaftur til Føroya, áðrenn hann kensluborin rundaði av við at hugleiða um týdningin av, at tað vit hava er eins egna og okkara.